**Tíðindabræv 11/2014 – Tekniskt**

SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

Sept., 2014

**SOLAS – broytingar í: 1. Kap. III Lívbjargingarútgerð og -skipanir, Partur B, Regla 19,** *og*
**2. Kap. V Siglingartrygd, Regla 19 – broytingar**

Sjóvinnustýrið skal gera vart við hjáløgdu samtykt **MSC.350(92)** frá IMO viðvíkjandi broytingum í SOLAS – í hesum føri serstakliga vísandi til:

- Bjargingartilbúgving umborð, upplæring og venjingar (Kap. III, Partur B, Regla 19), og
- Krøv til skip viðvíkjandi stýrisskipanum og tilhoyrandi kervi til navigering (Kap. V, Regla 19)

**1.** Viðv. Kap. III, Parti B, Reglu 19 skal serstakliga vísast til nýggja stk. 3.3, sum krevur at

- Sjófólk, sum hava ábyrgd í sambandi við arbeiði í lokaðum rúmi og tilhoyrandi bjargingartilbúgving, skulu í minsta lagi annanhvønn mánað gera bjargingarvenjingar umborð.

*Eng: Crew members with enclosed space entry or rescue responsibilities shall participate in an enclosed space entry and rescue drill to be held on board the ship at least once every two months.*

Sjóvinnustýrið skal nytta høvið at minna á, at slíkar venjingar mugu skjalfestast. Eftir at kravið kemur í gildi frá 1. januar 2015 er væntandi, at eftirlitsfólk hjá PSC fara at kanna hesi viðurskifti. Eru skjalfestingar ikki í samsvari við góðar mannagongdir, fer tað at verða tulkað, sum at ongar venjingar av hesum slagnum eru umborð. Sjóvinnustýrið fer so statt at mæla til, at venjingar og rættar mannagongdir verða settar í verk skjótast gjørligt og í góðari tíð **áðrenn 1. januar 2015**.

Í hesum sambandi verður eisini víst til Tíðindabræv nr. **08**/2014 – tekniskt, ið veitir leiðbeining frá IMO viðvíkjandi gassmátingartólum.

**2.** Viðv. Kap. V, Reglu 19 um dagførd krøv til stýris-/navigeringarskipanir og –kervi umborð á skipum, verður mælt til, at feløg leggja sær í geyma niðanfyri standandi freistir fyri íseting av útgerð á farmaskipum:

- Skip, ið eru 3,000 BT ella størri – ikki seinni enn fyrsta sýn eftir 1. januar 2016
- Skip, ið eru 500 BT ella størri (men minni enn 3000 BT) – ikki seinni enn fyrsta sýn eftir 1. januar 2017
- Skip, ið eru 150 BT og størri (men minni enn 500 BT) – ikki seinni enn fyrsta sýn eftir 1. januar 2018.

Gomlu krøvini í samtykt MSC.96(72) til útgerð, ið mátar og vísir ferð og fjarstøðu eru dagførd við nýggjari samtykt MSC.334(90). Krøvini eru gjørd galdandi fyri skip, ið verða bygd og latin eigara eftir 1. juli 2014. Sí hjálagda **MSC.1/Circ.1429**, sum greinar nýggju krøvini til útinningarevni soleiðis:

- [...] that both regulations (t.e. V/19.2.3.4 og V/19.2.9.2) should be fulfilled by two separate devices, i.e. one speed and distance measuring and indicating device capable of measuring speed through water and one separate speed and distance measuring and indicating device capable of measuring speed over the ground in the forward and athwartships direction..

Hjáløgd: MSC.390(92).
MSC.1/Circ.1429
Til kunningar:
MSC.334(90)
MSC.96/72)

--- 00 ---